# Samstarv um útflutning gevur úrslit í sjó- og ferðavinnu

**Marknaðarføring fyri útflutning kann vera ein tungur dansur ið ofta krevur bæði samskipan og samstarv millum fleiri partar – men ferðavinnan fær nógv burtur úr at fríggja til skipaumboð**



*Torleivur Mikkelsen, Tor Shipping.*

*Foto: Maria Olsen / PRnewsMedia.com*

MARKNAÐARFØRING

*Búi Tyril / PRnewsMedia.com*

Ein megin avbjóðing hjá stórum pørtum av vinnulívinum snýr seg um sokallaða "export marketing" – hvussu vit kunnu bera okkum at fyri at náa út um landoddarnar og vinna nýggjar marknaðir fyri okkara vørur ella tænastur; ein altíð afturvendandi spurningur.

Fáur vil mótmæla tí sjónarmiði at slíkar avbjóðingar eigur og má vinnan sjálv klára at møta, og tað roynir hon eisini: Ofta gjøgnum arbeiðið hjá teimum einstøku virkjunum, men ikki so sjáldan í bólkum sum samstarva um eitt átak, og viðhvørt við hjálp frá tí almenna.

"So lítlar fyritøkur sum tær føroysku hava sjáldan orku til at einsamallar taka lut á messum og øðrum tiltøkum," viðmerkti ein vinnulívsmaður. "Júst tí er tað ofta ein fyritreyt at kunna fara út í felag," legði hann afturat.

Undir leiðslu av Kjartani Kristiansen hevur Menningarstovan, ein stovnur undir Vinnumálaráðnum, í nógv ár gjørt sítt fyri at hjálpa føroyskum fyritøkum í sambandi við handilsferðir, messur og annað. Fyri ikki langari tíð síðani gjørdi Menningarstovan, sum partur av umsitingarligum og lógarligum broytingum, av at stovna eina serliga Útflutningsdeild. Hendan deildin hevur síðani, undir leiðslu av tí ágrýtna vestmenninginum Áka Johansen, gjørt vart við seg gjøgnum eitt tal av nýggjum tiltøkum.

Eitt av tiltøkunum er Export Directory, ein webbaserað skrá yvir føroyskar útflutnings fyritøkur vend móti útlendskum fyritøkum. Onnur tiltøk eru handilsferðir, gjarna í nýggjum høpi. Sum til dømis í september, tá Menningarstovan tók lut á World Fishing Exhibition, ein sera stór altjóða framsýning fyri fiskivinnuútgerð hildin 6. hvørt ár í Spania, og tók sjey føroyskar fyritøkur á handilsferð í sambandi við framsýningina.

## Týðandi latín

"Tann brennandi spurningurin hjá nógvum útflutnings fyritøkum er hvussu brýtur ein seg inn í nýggjar marknaðir," viðmerkti Annleyg Lamhauge, ið ber heitið International Business Developer og starvast saman við Áka Johansen á Útflutningsdeildini hjá Menningarstovuni.

"At luttaka á framsýningum uttanlands er ein góður máti at koma í samband við keyparar og seljarar, tí allir eru samlaðir á sama stað í einum ávísum tíðarbili. Uppruna orsøkin hjá okkum at fara til Vigo í Spania í september var framsýningin World Fishing Exhibition í døgunum 17-23. september. Og eftirsum Spania er ein nýggjur marknaður fyri flestar føroyskar fyritøkur, avgjørdi Menningarstovan at royna eina handilsferð undan framsýningini."

Handilsferðin, sum fór fram í umráðnum kring býin Vigo, varð løgd til rættis soleiðis at fundir vórðu planlagdir við reiðarí og fyritøkur ið selja útgerð til fiskivinnu. Hetta varð gjørt í samstarvi við ta donsku sendistovuna í Madrid.

Meðan mexikanskt gifti Áki Johansen, sum hevur arbeitt fyri tað danska Exportráðið í Mexiko, er væl og virðiliga stinnur í sponskum máli, so dugir Annleyg Lamhauge franskt sum onnur duga eingilskt. Tað skerst ikki burtur at hesi latínsku mál hava ein stóran týdning í altjóða handilshøpi – og at nógvar fyritøkur kundu fingið nógv burturúr at havt tílíkan málkunnleika.

Tær sjey føroysku fyritøkurnar sum tóku lut undir hattinum hjá Menningarstovuni í sambandi við World Fishing Exhibition, vóru Teleserve, Oilwind, Tor Shipping, Vónin, Eltalvuvirkið í Gøtu, Føroya Tele og North Atlantic Fish Fair.

Hóast fleiri lótu væl at ferðini, vildu fá úttala seg av ótta fyri at renna á leistum við óbúnum niðurstøðum.

"Vit mugu hava tol her tí tað fer at taka langa tíð áðrenn og um nakað ítøkiligt spyrst burturúr," helt Torleivur Mikkelsen, stjóri á Tor Shipping.

Torleivur Mikkelsen var sum heild væl nøgdur við túrin í Spania, tó hann helt tað skein rættiliga týðiliga ígjøgnum at fiskivinnan har eins og í nógvum øðrum londum hevur trupulleikar orsakað av rávørutroti og skerdari veiðu.

"Alt fungeraði sum tað skuldi, vit møttu kontaktum og tað var ógvuliga positivt… Vit kunnu bara ikki hava ov stórt bjartskygni hvat fiskivinnuni nógvastaðni viðvíkur; trupulleikarnir við tilfeingi og kvotum og øllum tí yvirskugga nógv beint nú og spaniólar eru einki undantak í so máta, tvørturímóti… Varsemið er stórt."

"Hinvegin mugu vit hugsa frameftir og alla tíðina síggja til at vera virkin hvat marknaðarføring viðvíkur – annars hava vit ongan kjans."

Tor Shipping arbeiðir á altjóða stigi og virksemið kann býtast upp í økini keyp og søla av skipum, skiparakstur í sambandi við FAS (Føroysku Altjóða Skipaskrásetingina), og skipaumboðan. Teir flestu kundarnir eru úr flutningsog ferðavinnuni, fiskivinnuni, og oljuvinnuni.

Í løtuni merkist nógv til framgongd innan ferðavinnuna, upplýsti Torleivur Mikkelsen.

Hetta kann hava samband við marknaðarføringar arbeiði sum er gjørt í nógv ár í samstarvi við millum annað Tórshavnar Havn.

Millum teir kundar sum Tor Shipping umboðar í Føroyum, teljast stór ferðamannaskip sum Rotterdam, Seven Seas Navigator, The World og Costa Allegra, men eisini smærri og exklusiv skip sum Silver Whisper.

## Ítøkilig úrslit

Meðan ferðavinnan ofta verður roknað sum ein vinna fyri seg, so er eitt samstarv millum sjó- og ferðavinnu ofta meiningsfult, nevniliga tá talan er um ferðing sjóvegis.

Tað er sum so einki nýtt at feløg sum Smyril Line kombinera sjóvinnu og ferðavinnu, men í øllum førum vísa nú almennar upplýsingar at tað árliga talið á útlendskum ferðamannaskipum sum koma á Havnina stendur í stórum vøkstri.

Eitt drúgvt arbeiði við ferðavinnu marknaðarføring er við øðrum orðum so smátt við at vísa ítøkilig úrslit.

"Vit kunnu bara fegnast um gongdina," viðmerkti Torleivur Mikkelsen. "Hetta er gott fyri allar partar og er kappingar neutralt hvat viðvíkur teimum stóru pørtunum av okkara ferðavinnu ið hava føroyingar og okkara grannafólk sum marknað. Tað langa og tunga arbeiðið við ferðavinnu marknaðarføring sum Tórshavnar Havn hevur gjørt tey seinastu 10-15 árini saman við skipaumboðum sum Skipafelagnum Føroyar og Tor Shipping og túroperatørum sum MP Tours og Hoyvíking Tours, sær nú út til at geva bonus."

Partarnir hava nevniliga marknaðarført Føroyar og síni egnu feløg saman við íslendingum og grønlendingum á altjóða messum undir felags heitinum The North Atlantic Islands.

Umboðanar arbeiðið verður vanliga ikki roknað sum partur av ferðavinnuni, heldur ikki tá talan er um ferðamannaskip. Hinvegin verður tað sum snýr seg um tænastur til ferðafólkið vanliga roknað undir ferðavinnuna.

Tá ið eitt skip er innklarerað av teimum føroysku myndugleikunum saman við havnaumboðunum, byrjar ferðavinu virksemið við túrum og øllum tí.

"Í grundini er tað soleiðis at eitt stórt ferðamannaskip hevur vanliga tveir agentar," greiddi Torleivur Mikkelsen frá. "Havnaumboðið er tann sum klarerar og umboðar reiðaríið og skipið í viðkomandi havn meðan túr operatørurin tekur sær av ferðafólkunum."

Hvat oljuvinnuni viðvíkur hevur Tor Shipping vónir um at síggja nøkur seismikk skip aftur í Føroyum í næsta ár. Higartil hevur verið ójavn á hesum øki men felagið hevur gjørt nakrar klareringar umframt skipatænastur fyri oljuvinnuna.

Hinvegin gongur eitt sindur striltið at fáa útlendsk skip at skráseta seg undir FAS, eftir øllum at døma av tí einfaldu orsøk at skipanin ikki er nóg fyrimunarlig.

"Vit hava skilt at Fíggjarmálaráðið skal koma við einum nýggjum lógaruppskoti um eina sokallaða tonnagu skattaskipan – vit síggja fram til hetta og vóna at tað verður skjótt."




Runavíkar Havn



Runavíkar Havn veitir tænastur innan fiskivinnu,farmaflutning, ferðavinnu og oljuvinnu

www.runavik.fo

Sosialurin 341800



D6-310 DP OKKARA MEST EFFEKTIVI DIESEL MOTORUR NAKRANTÍÐ

Tann nýggi D6-310. Við 6 sylindarum,
310 hestum, elektroniskt stýrdum
"common rail" brennoljuinnspræning,
og tí nýggja DP drevinum, fært tú sigliførleikar,
sum yvirganga allar aðrar diesel motorar við Z-drevi.
Brennoljunýtslan og útstoytsútlatið er merkiligani lágt.
D6 er 5.5 litur, men við ísetanarmálum á einum 4 liturs motori,
er tað nú møguligt at íseta meiri kraft í sama pláss.
Setur nýtt støði fyri diesel styrki...




les tíðindini á www.volvopenta.com

VOLVO PENTA

Bátatænastan P/F
Gríms Kambansgøta 4 · Postsmoga 101
FO-110 Tórshavn · Tel 311735 · Fax 313835

Sosialurin 341800